## DAGSINS MEINING

# Raðfestingin er skeiv

Fíggjarlógarálitið skal nú viðgerast, men longu nú er greitt, at raðfestingin er ikki góð nokk. Samgongulimir erpa sær altíð av hvussu nógv prosent játtanin til eitt nú almanna og heilsuøkið er økt seinastu árini. Spurningurin er ikki hvussu nógvir pengar verða brúktir, spurningurin er hvussu hesir pengar verða brúktir. Tað er stór skomm, at útreiðslurnar til almanna og heilsumál eru øktar í stórum, uttan at brúkarin, tað vil siga skattgjaldarin, merkir eina betri tænastu í eldrarøkt og ikki minst á landssjúkrahúsinum. Tað er stór skomm, at man noyðist at avlðsa viðgerð ella viðtalu á landssjúkrahúsinum, tí at tað lekur so illa. Ikki minst tá hugsað verður um, at man í svárastu krepputíðum megnaði at seta 10 milliónir av til viðlíkahald i einum fíggjarári – meira enn Karsten Hansen megnar í allarbestu tíðum.

Vilhelm Johannesen hevur fyrr og aftur til hesa fíggjarlógarviðgerð funnist at kostnaðinum av umsitingini, ið er vaksin eksplosivt tey seinastu árini. Ongantíð so nógv, sum undir einum borgarligum løgmanni við einum samstarvsflokki, ið ynskir at føroyingar gerast minni heftir av donskum blokki. Størri umsitingin er, tess meira tðdning hevur blokkurin. Í løtuni hevur eingin justerað umsitingina til tann búskaparliga veruleikan aftaná blokkniðurskurðin uppá 366 milliónir, men hetta er tí, at raðfestingin er so út av lagi vánalig. Hvussu leingi fer brúkarin av almennum tænastum at finna seg í lekandi sjúkrahúsum og bíðilistum? Vit eru dag og dagliga vitni til, at almennir stovnar, ið hava beinleiðis samband við borgaran skulu spara og tí lækka tænastustøðið.

Tíverri sær tað út til, at almennu stovnarnir aftur skulu spara, meðan lítið verður spart í umsitingini. Gamaní okkurt verður endurskoðað, men sum heild er ikki samsvar millum orðini hjá Løgmanni og samgongulimum, um at teir eru varugir við tað óhepna í at hava ein rakstrarkostnað uppá á leið hálvtannaðhundrað milliónum um árið í reinari umsiting, meðan spart verður á stovnum og almennum skipanum við tí sera óvísindaliga salamiháttinum.

Bygnaðurin er skeivur og tí hava vit eina ov dðra umsiting. Starvsfólkið er óivað bæði dugnaligt og nærlagt, men bygnaðurin má dagførast, so skattgjaldarin fær sum mest burturúr. Tað kann ikki vera populert í umsitingini, at blokkurin varð niðurskorin við 366 milliónum. Hetta fer at merkjast, og við rættari raðfesting, so má man fyrbyrgja, at skúlabørn, sjúklingar og pensionistar fara at merkja tað. So er ikki nógv í at velja, enn at rationalisera umsiting av almennu tænastunum við at desentralisera og skera burtur óneyðugt dupultkontroll og deildir, ið eru góðar at hava, men ikki neyðugar. Ógvusligi blokkniðurskurðurin kemur at gera, at alt tað, sum er gott at hava má útsetast og minkast til frama fyri tær almennu tænasturnar, ið eru líveðrin í vælferðarsamfelagnum. Hetta sæst tíverri ikki aftur í politikki samgongunar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bjarni Djurholm mótvegis Skálafjarðasiglingini

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður*



Mikudagin 11. desember (dagin eftir at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður hevði klipt snórin við Vágatunnilin), legði sami landsstýrismaður uppskot fyri tingið, um at niðurleggja Skálafjarðar-siglingina. Hetta er triðju ferð, at ein landsstýrismaður úr Fólkaflokkinum roynir at niðurleggja hesa søguligu rutu. Fyrst var tað Svend Aage Ellefsen, síðani Finnbogi Arge og nú Bjarni Djurholm. Í somáta royndist Fólkaflokkurin Eysturoynni illa.

Øll gleðast vit um tað stóra framstig, sum Vágatunnilin er fyri Vágoynna og alt Føroya fólk, og tí er tað hugstoytt at síggja, at ein niðurbróting á samferðsluøkinum skal henda í øðrum økjum av landinum.

Mest trafikkeraðu øki í landinum eru í Eysturoynni og Streymoynni. Hvørt samdøgur koyra umleið 2.700 bilar gjøgnum Norðskálatunnilin, og umleið 4.000 bilar gjøgnum Kollfjarðatunnilin. Tá Norðoyatunnilin verður veruleiki, kann roknast við, at ferðslan millum Eysturoy og høvuðsstaðarøkið fer at økjast munandi.

Kanningar hjá Landsverksfrøðingsstovninum vísa, at tað er ikki einans talið av bilum, sum er nógv økt tey seinnu árini, men akførini eru eisini vorðin munandi tyngri, nú meginparturin av allari frakt í Føroyum fer yvir land, har hon áður fór sjóvegis. Til dømis var tunga ferðslan í Eysturoy (roknað sum akfør longri enn 5,80 metrar) umleið tríggjar ferðir so stórur partur av samlaðu ferðsluni í oynni í 2001, samanborið við 1996.

Tá Dúgvan sigldi millum Skálafjørðin og Havnina, sigldu nógv (bæði ferðafólk og bilar) við. Men síðani rutan var niðurprioriterað (fyrst við einum minni skipi, og seinni varð als ikki loyvt at taka bilar við), hava færri nýtt hesa farleið. Eisini hevur tað verið eitt stórt afturstig fyri siglingina, at rutan summar tíðir hevur verið niðurløgd, og síðani byrjað aftur av nýggjum.

Tað er einki at ivast í, at tørvur er á at menna samferðslukervið millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið. Í fyrstu atløgu eigur ein skjóttgangandi bilferja at verða sett í fasta sigling og um fá ár kemur ein undirsjóvartunnil at verða gjørdur millum Skálafjørðin og Hvítanes..

Sambandsflokkurin tekur ongantíð undir við teimum niðurbrótandi kreftum, og tí fær landsstýrismaðurin ikki nakað herðaklapp frá okkum fyri ta niðurbróting av rutuni, sum hann hevur gjørt gjøgnum mong ár.

Hvussu sveinaroyndin hjá Bjarna Djurholm fer at eydnast, veit eg ikki, men sambandið millum Havnina og Skálafjørðin gongur eini samfelagsmennandi framtíð í møti.

# Glarlist forvitnisliga framsýning í SMS

**FRAMSÝNING**
*Tíðindaskriv*

Frá hósdegnum 12. til leygardagin 14. desembur er forvitnislig framsýning av lutum úr formstoyptum glasi á Torginum í SMS.

Tað eru Elisabeth og Páll Ellingsgaard, sum, eftir at hava búð í Danmørk í sløk 50 ár, eru flutt heim aftur til Føroya. Tey hava sett á stovn fyritøkuna, Glarlist, ið framleiðir formstoypt glas.

Hjúnini hava seinastu 15 árini fyrireikað seg til eina virkna tilveru sum eftirlønt. Tey hava gingið á nógvum skapandi skeiðum; serliga í list og handverki.

Elisabeth, sum bæði er skapandi og hevur listaligar gávur, hevur millum annað nomið sær kunnleika hjá Peirrè Gaborit, myndahøggara, og Susanna Havsteen Mikkelsen, listamálara. Í glarlist hevur Elisabeth fingið frálæru hjá Else Willumsgaard, glaslistakonu.

Stundum hevur høvi verið at sýnt fram, og hevur Elisabeth millum annað sýnt fram á ymsum stovnum og í listafeløgum í Keypmannahavn og økinum nærhendis.

Páll, sum hevur góðar handaligar gávur, hevur gingið til silvursmíð og violinbygging.

Saman hava tey bygt sær ein stak hugnaligan og prýðiligan verkstað Uppi á Grind á Eiði. Verkstaðurin er gjørdur av tveimum stórum bingjum, sum eru klæddar og taktar soleiðis, at tær hóska væl til vakra umhvørvið. Í bingjunum er gólvvíddin 60 fermetrar.

Rávøran er hondrullað amerikanskt glas av ymsum slagi. Annars er formstoypta glasið føroysk framleiðsla burtur av.

Glarlistaverkini, sum Elisabeth ger, eru ætlað bæði sum prýðislutir og til dagliga nýtslu; í at velja eru t.d. skálir, føt, ljósastakar, oljulampur og øskubikør.

Lutirnir, sum verða sýndir á torginum í SMS frá 12. til 14. desembur, eru til keyps í 3´aranum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Jólakonsert í Vestmanna

**Jólini nærkast, og jólakonsertirnar verða hildnar víða um. Sunnudagin fara tvey kór í Vestmanna at hava felags jólakonsert í Vestmanna Kirkju**

**JÓLAKONSERT**
*Edvard Joensen*

Í Vestmanna eru ikki færri enn tvey kór. Vestmanna Sangkór og Vestmanna Kirkjukór. Tey fara at hava jólakonsert í Vestmanna Kirkju sunnudagin klokkan 18.00.

Vestmanna Kirkjukór verður stjórnað av Erlu Olsen, organisti við Vestmanna Kirkju, meðan tað er Kári Bæk, tónleikalærari, sum stjórnar Vestmanna Sangkóri.

Á stóru felags jólakonsertini fara kórini í Vestmanna fyri tað mesta at syngja gamlar, kendar jólasálmar og -sangir. Onkran tó í eitt sindur nýggjari líki, siga kórini í tíðindaskrivi. Eisini verða verk hjá útlendskum tónaskøldum á skránni.

Fyrst syngur Vestmanna Kirkjukór. Síðan verður ein felagsframførsla, og Vestmanna Sangkór fer at enda konsertina.

Vestmanna Sangkór er vanligt, blandað kór, meðan Vestmanna Kirkjukór er eitt gentu- og kvinnukór.

Á skránni hjá Vestmanna Krkjukóri eru bæði kend og minni kend verk. Byrjað verður við sanginum: Eitt ljós mær geislar sendir, sum Johannes Mortensen hevur týtt til føroyskt. Lagið er norskt. Síðan er tað væl kendi jólasálmurin: Eitt barn er føtt í Betlehem. O, come all yee faithfull, eftir J.Å. Hillerud og David Villcock er væl kendur, eins og Halleluja úr Messiah hjá Händel eisini er tað. Síðan er tað Glory halleluja, eftir Noru E. Burne og Nothing is impossible, eftir Eugene E. Clark.

Tá Kirkjukórið er liðugt við sína skrá, fara kórini bæði saman at syngja: Eg standi tíni krubbu hjá, eftir J.S. Bach , P. Gerhardt og H.A. Djurhuus. Síðan verður sungið sum veksilsangur saman við kirkjufólkinum: Her koma Jesus tíni smá.

Vestmanna Sangkór eigur so seinasta partin av jólakonsertini í Vestmanna Kirkju. Sungið verður fyrst: Jólaklokkan aftur ringir, eftir Knút Olsen og Jakob Jakobsen. Síðan kemur: Mítt hjarta tilhald hevur, eftir Carl Nielsen, Brorson og Axel Tórgar. Eingilin við ljósi fer, hava Ingemann og Weyse gjørt, meðan Axel Tórgarð týddi til føroyskt. Hin vænasta rósan er eftir Klug og Brorson. Føroyski týðarin er ókendur. Endað verður við Himmalsins harpum, eftir C.E.F. Weyse og Jógvan Nolsøe.



*Vestmanna Kirkja verður karmur um jólakonsert hjá Vestmanna Kirkjukóri og Vestmanna Sangkóri sunnukvøldið*
*Mydn: Edvard Joensen*

## VIÐMERKINGAR

# Rúni Hentze og rættartrygd

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Í bløðunum síðsta vikuskifti spyr Rúni Hentze "Hvat vilja Astrup og Javnaðarflokkurin?". Orsøkin til spurning hansara er m.a. drúgva orðaskiftið á tingi síðsta hósdag, tá Høgni Hoydal svaraði fyrispurningi frá mær um m.a. samstarvsavtaluna millum Elektron og PBS (Pengeinstitutternes Betalingsservice).

Um Astrup hevur onnur motivir enn nærlagni í sínum arbeiði, ætli eg mær ikki at gita um. Hann er nevndarformaður í Elektron, har landsstýrið eisini hevur nevndarlim. Elektron søkti fyrr í ár Dátueftirlitið, ið umsitir løgtingsins vilja, tá talan er um at flyta persónsupplýsingar av landinum, um loyvi at flyta slíkar upplýsingar av landinum í samband við nýggju Gjaldsskipanina, ið teir ætlaðu at menna í samstarvi við PBS. Fyrst vildi Dátueftirlitið ikki geva loyvi, men aftaná at Elektron hevði lýst málið nærri, varð loyvið givið.

Rúni Hentze sígur í grein síni, at trýst varð lagt á Dátueftirlitið, so tað at enda mátti geva loyvi. Hetta eru álvarsamar skuldsetingar at seta ímóti eftirlitinum, og Rúni Hentze eigur tí at biðja Høgna Hoydal, ið hevur ábyrgdina av lógini og harvið eisini av eftirlitinum, kanna málið. Dátueftirlitið eigur eisini alment at vátta ella avsanna hesar skuldsetingar og harumframt greiða almenninginum frá um hetta málið í síni heild.

Rúni Hentze spyr eisini, hvat Javnaðarflokkurin vil. Javnaðarflokkurin hevur onki við hetta mál at gera, og flokkurin hevur hvørki sagt ella skrivað eitt orð um hetta málið.

Rúni Hentze kundi spurt, hvat eg vil við málinum. Eg vil ikki annað enn at tryggja at øll eru líka fyri lógini og at metingarnar av, hvørjir persónsupplýsingar kunnu fara av landinum byggja á saklig atlit og onki annað. Eru Rúni Hentze og Høgni Hoydal bangnir fyri at EDV-førleikin á Elektron fer fyri bakka orsakað av Gjaldsskipanini, so mugu teir fáa samtykt lógaruppskot í tinginum, har tað greitt verður ásett, at tað er bannað Elektron at samstarva við PBS um Gjaldskipanina. Tá er málið klokkureint og ongum gerst neyðugt at meta um tingsins vilja, ið er eitt diffust og ógjørligt atlit at taka við í eina málsviðgerð, eisini hjá Dátueftirlitinum.

At Rúni Hentze metir, at orðaskiftið í tinginum meiri var ein viðgerð av, tí eftir hansara tykki, altíð sakliga Høgna Hoydal, enn av málinum, má metast sum skemt. Hvussu sakligur Høgni Hoydal var undir viðgerðini av fyrispurninginum, er til skjals.

Høgni Hoydal var so "sakligur", at tá hann onki annað argument hevði, so førdi hann fram, at ávísir lobbiistar høvdu lagt trýst á løgtingsmenn. Eg boðaði honum tá frá, at um hann kundi finna ein einasta lobbiist, ið eg hevði tosað við, áðrenn eg setti fyrispurningin, so skuldi eg taka meg úr Løgtinginum í stundini.

Høgni Hoydal tvíheldur enn um, at hann bert ger eftir tingsins vilja, tá hann nú við kunngerð, afturvirkandi, ætlar at steðga áðurnevndu Gjaldsskipan. Heitt var á hann um at skipa fyri eini hoyring um málið, so løgtingið kundu fáa betri innlit í torgreidda problematikkin viðv. persónsupplýsingum í síni heild, tí at tingið harvið gjørdist betri ført fyri at meta um sín vilja. Hetta kveistraði hann til viks, lítilátin sum hann jú er um sín egna førleika og leiklut í politikki.

Rúni Hentze eigur sum lóggevari at tryggja sær, at øll eru líka fyri lógini og at øll verða viðgjørd eins og hann átti ikki at lagt seg upp at rættarfatanini hjá Høgna Hoydal, at man við eini nýggjari kunngerð kann taka givin loyvi aftur. Hetta eigur ikki at koma fyri í einum rættarsamfelag.

# Verk fyri kór, solistar og orkestur

**TÍÐINDASKRIV**
*Havnarkórið*

Fyri árum síðan setti Havnarkórið sær fyri árliga fram móti jólum at framføra okkurt størri tónaverk fyri kór, solistar og orkestur. Seinastu 6-8 árini er tað vorðið føst siðvenja annað hvørt árið at hava Händels Messias og annað hvørt Jólaoratoriið eftir J.S.Bach. Í fjør varð oratoriið Messias framført í Fuglafjarðar Kirkju og í Vesturkirkjuni, og í ár verður Jólaoratoriið at hoyra **leygardagin 14. desember kl.17.00 í Vesturkirkjuni og sunnudagin 15. desember kl. 17.00 í Gøtu Kirkju.**

Solistar verða:
Berghild Poulsen, sopran
Súsanna Dalsgaard, alt
Jonas Fosdal, tenorur
BergÞór Pálsson, bassur

Orkestrið mynda lærarar í føroyska musikkskúlanum saman við sínum fremstu næmingum. Oboistarnir koma tó tríggir úr Íslandi og ein úr Danmørk.

Dirigentur hesaferð er Ólavur Hátún.

At fáa slíkt tiltak í lag er eitt tungt tak, serliga tá hugsað verður um tað fíggjarliga. Tí sjálvt um kórið á hvørjum sinni møtir vælvild frá almennum mentanarstovnum og viðkomandi kirkjum og kommunum, er ilt at fáa endarnar at røkka saman. Ikki er tað enn her í Føroyum eins og aðrastaðni møguligt at lata fólk rinda atgongupening til kirkjuligar tónleikaframførslur. Men um fólk sjálvboðin vilja stuðla tiltakinum, verður høvi til tað. Íløt verða sett fram í báðum kirkjum, og kórið takkar fyri tann stuðul, ið verður veittur.